UTTAN ÚR HEIMI

# Taliban á veg uppaftur



*Taliban hevur lært av tí, sum hendir í Irak og brúkar nú bilbumbur og sjálvmorðsbumbur. Hesin bilurin fór í luftina í býnum Herat í gjár*

**Fyri fýra árum síðani róku amerikanararnir Taliban frá valdinum í Afghanistan, men nú er rørslan á veg uppaftur**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er vorðið eitt vanligt vártekin í Afghanistan, at tá kavin tiðnar í fjøllunum við pakistanska markið, fer Taliban undir síni álop. Soleiðis var í fjør, og soleiðis er aftur í ár. Mikudagin søktu fleiri hundrað talibanar at býnum Mosa Qala í Helmand-landspartinum, og tá teir tóku seg aftur, lógu 13 afghanskir stjórnarhermenn og 40 talibanar eftirá.

Álopið á Mosa Qala er tað størsta hjá Taliban, síðani rørslan varð koyrd frá, sigur varaguvernørurin í Helmand við Reuters. Amerikanski herovastin í Afghanistan, generalurin Karl Ekenberry, viðgongur eisini fyri Reuters, at í summum økjum ger Taliban meiri um seg í ár enn í fjør. Sambært generalinum hevur Taliban lært av tí, sum er hent í Irak, tí rørslan er farin at brúka sjálvmorðsbumbumenn og fjarstýrdar bumbur í álopum sínum á afghanska herin og teir útlendsku hermenninar.

Ein blaðmaður hjá New York Times, sum júst hevur verið í Afghanistan, skrivar í blaðnum, at Taliban er allastaðni og hevur ræðið á fleiri bygdum har suðuri í landinum.

Amerikanararnir mettu í fjør, at Taliban hevði millum 2.000 og 10.000 vápnaðar menn, og at teir flestu halda til pakistonsku megin markið. USA hevur eisini fýlst á, at Pakistan ger ov lítið fyri at berja Taliban niður, og pakistanskar keldur hava eisini váttað, at rørslan hevur at kalla frítt at fara á marknaleiðini. Reuters skrivar frá ónevndum keldum í Pakistan, at har er tað vanlig uppfatan, at Taliban kemur aftur til valdið, tá teir útlendsku hermenninir fara úr Afghanistan, og tí hevur pakistanska stjórnin lítlan hug at gera rørsluni ónáðir.

## Rætting

Tíverri var telefonnummarið til bílegging av atgongumerkjum til sjónleikin "Hvør vann í dag" á Oyrabakka komið skeivt fyri í blaðnum í gjár.

Rætta telefonnummarið er 21 68 70.

Vit biðja orsaka mistakið.

# USA girðir seg inni

**Amerikanska Senatið hevur samtykt at byggja ein 595 kilometrar langan múr fram við meksikanska markinum**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Múrurin røkkur bara ein part av markinum, sum er heilar 3.200 kilometrar langt, men stendur tað til Umboðsmannatingið, verður hann longri. Har hava politikararnir fyrr samtykt at gera múrin meiri enn 1.000 kilometrar langan, men sum skilst verður tað Senatið, sum fær sín vilja.

Múrurin er úrslit av drúgvum og hvøssum orðaskifti um teir nógvu meksikanararnar, sum koma um markið til USA. Í síðstu viku gjørdi George W. Bush, forseti, av at senda 6.000 mans hjá tjóðarhirðini at halda eyga við markinum, men Senatið heldur múrin vera neyðugan kortini.

Umframt múrin er ætlanin at verja markið við tyrlum og nútímans myndatólum, samstundis sum fylgisveinar skulu halda eyga við marknaleiðunum. Hvítu Húsini hava longu biðið fyritøkurnar Lockheed, Northrop Group og Raytheon um tilboð um á eftirlitið, sum sambært New York Times fer ar kosta fleiri milliardir dollarar.

Meiningakanningar vísa, at amerikanarar vilja heldur hava USA at útvega arbeiðspláss í Meksiko. 92 prosent halda, at tað hevði steðgað teimum ólógligu innflytarunum, og bara 1,2 prosent halda, at ein múrur eftir markinum fer at loysa trupulleikarnar.

STUTT SAGT

## Næstan funnin

Amerikanska samveldisløgreglan sigur seg vera sannførda um, at líkið av fyrrverandi fakfelagsleiðaranum Jimmy Hoffa verður funnið fyrsta dagin. Tann umstríddi fakfelagsleiðarin hvarv í 1975, og síðani hava nógvar søgur gingið um, hvat bleiv av honum, og hvør beindi hann av vegnum. Jimmy Hoffa var 62 ára gamal, tá hann brádliga hvarv.

Í gjár avbyrgdi FBI eitt øki tætt við ein rossagarð uttan fyri stórbýin Detroit, og Daniel Roberts hjá FBI sigur við sjónvarpið CNN, at ætlan er at leita í einum jarðarstykki, sum er einar 10 metrar breitt og einar 30 metrar langt. FBI-menninir skulu leita við spaka, samstundis sum servandir hundar skulu snodda í moldini so hvørt.

Daniel Roberts vil ikki siga meiri um leitingina, men hann heldur uppá, at hesaferð heldur FBI seg hava fingið álítandi upplýsingar. Hann væntar, at leitingin uttan fyri Detroit fer at taka nakrar vikur.

## Heimsins størsta á ferð

Heimsinsstørsta ferðamannaflogfar, Airbus 380, er í hesum døgum á royndarferð í fleiri londum.

Ferðin er kortini avmarkað, tí tað eru bara 16 flogvallir, sum kunnu taka ímóti tí stóra flogfarinum. Í gjár kom Airbus 380 úr Berlin til Heathrow-floghavnina í London, men hon mátti byggjast út og broytast fyri næstan eina hálva milliard krónur, áðrenn Airbus 380 kundi seta seg har, sigur BBC. Nógv varð eisini gjørt burtur úr teirri fyrstu ferðini, og Gordon Brown, fíggjarmálaráðharri, var í Heathrow og tók ímóti tí stóra gestinum.

Ætlanin er, at Airbus 380 skal í rutuflúgving seinni í ár, men rutunar eru sjálvandi eisini avmarkaðar, tá bara 16 flogvallir eru egnaðir til flogfarið.

## Kann ikki stevna CIA

Ein dómstólur í amerikanska statinum Virginia hevur gjørt av, at týski ríkisborgarin Khaled El-Masri kann ikki stevna amerikonsku fregnartænastuni CIA og krevja endurgjald, tí CIA burturflutti hann fyri tveimum árum síðani.

Amerikonsku myndugleikarnir hava viðgingið, at CIA burturflutti Khaled El-Masri sum lið í bardaganum ímóti yvirgangi og flutti hann til eitt fongsul í Afghanistan, men at tað var eitt mistak. Sambært týska innanríkisráðnum skal El-Masri hava fingið 500.000 dollarar í endurgjaldi, men tað avsannar sakførari hansara, Manfred Gnijdie. Umframt endurgjald vil El-Masri hava eina almenna umbering frá amerikonsku myndugleikunum, sigur sakførarin við AP.

Tað vakti stóran ans í Týsklandi, tá tað kom fram, at CIA hevði burturflutt ein týskan ríkisborgara.

## Sluppu ikki til Zimbabwe

Myndugleikarnir í Zimbabwe hava lítlan hug at lata útlendsk fakfelagsfólk sleppa inn í landið, og tað fingu nøkur umboð hjá fakliga landsfelagsskapinum í Noregi at kenna fyrr í vikuni.

Nina Mjøberg, sum starvast á altjóða deildini hjá norska LO, fekk ikki innferðarloyvi í Zimbabwe mikudagin, og sama dag fór zimbabwiska løgreglan á eitt gistingarhús eftir einum LO-umboði úr Zambia, sum fekk boð um at fara av landinum beinanvegin. Tey bæði skuldu taka lut á einari ráðstevnu, sum fakligi landsfelagsskapurin í Zimbabwe skipar fyri.

Altjóða LO hevur mótmælt framferðini hjá zimbabwisku myndugleikunum, og tað fer norska LO eisini at gera, skrivar Aftenposten. Ætlanin er eisini at fáa norska uttanríkisráðið upp í leikin, so tað kann senda stjórnini hjá Robert Mugabe, forseta eitt formligt mótmæli, skrivar blaðið.